# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 02.12.25 |
| Mál nr.: | 25/27937 |
| Málsviðgjørt: | DH/JS |
| Ummælistíð: | 20. okt. 25 til 14. nov. 25 |
| Eftirkannað: | 28.11.2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)**
(Striking av áseting um lægri veiðigjald, tá ið tøka kvotan minkar serliga nógv)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 77 frá 5. mai 2021 um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023 og løgtingslóg nr. 41 frá 25 mars 2025, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 5 stk. 3 og § 6, stk. 2 verður ", samanber tó § 7, stk. 2" strikað.

**2.** § 7 verður strikað.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

§ 7 í veiðigjaldslógini ásetir helvtargjald, um tøka kvotan er lægri enn 50% av miðal tøku kvotuni seinastu 5 árini.

Endamálið við undantakinum í § 7 er at taka lægri veiðigjald, um kvoturnar minka serliga nógv, og tað hevur við sær, at vinnan fær munandi lægri inntøkur.

Í 2025 minkaðu kvoturnar á makreli og sild munandi, eftir at Føroyar høvdu gjørt semju við hini strandarlondini, um hesi fiskasløg, men serliga fyri makrelin er prísurin hækkaður sera nógv. Prísurin er eisini hækkaður fyri sild, tó ikki líka nógv, sum fyri makrelin.

Í november í 2024 varð uppskot sent til hoyringar, sum m.a. strikaði § 7 í veiðigjaldslógini.

Eftir hoyringina bleiv uppskotið broytt, so at ásetingin fyribils bert varð strikað fyri makrel í 2025, tí ásetingin greitt virkaði ímóti sínum endamáli.

Orsøkin til, at tað ikki varð hildið fast við at strika ásetingina fyri øll fiskasløgini, var m.a. stutta skotbráið fyri hoyringina.

Verandi skipan setur veiðigjaldið út frá prísum árið fyri, og tí ávirkar hækkan av prísi ikki ásetta veiðigjaldið fyrr enn árið eftir. Vinnan fær tí, í verandi skipan, eitt ár at tillaga seg, áðrenn veiðigjaldið hækkar, tá prísurin hækkar.

Harafturat er tað galdandi fyri uppsjóvarskip, at tey fiska fleiri fiskasløg, og tí kann tað vera óneyðugt at taka serlig atlit, um stórar broytingar henda í einum fiskaslagi.

Verandi áseting um helvtargjald ger, at veiðigjaldið broytist ógvusliga rundanum árskiftið, um kvotan er minni enn eitt ávíst. Hetta kann viðvirka til, at kvota verður flutt tvørturum ár fyri at spara veiðigjald.

Harafturat verður tað mett óheppið, at avtalur, sum Føroyar ger við onnur lond um býti av fiski, skal hava so stóra ávirkan á veiðigjaldið.

Skotið verður tí upp at strika § 7 um helvtargjald.

**1.2. Galdandi lóggáva**
§ 7 ásetur, at veiðigjaldið lækkar niður í 50% av veiðigjaldinum, um kvoturnar minka serliga nógv. Endamálið við ásetingini er, at fiskiførunum verður álagt eitt lægri veiðigjald, um munandi lægri kvota hevur við sær, at vinnan fær munandi lægri inntøkur.

Galdandi lóggáva tekur ikki hædd fyri, at hægri prísur ofta vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Verandi áseting kann tí virka ímóti sínum endamáli.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
*Strika áseting um lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv*
Galdandi lóggáva tekur ikki hædd fyri, at hægri prísur ofta vigar upp ímóti eini lægri kvotu. Í løtuni er tað støðan. Eftir semjuna um makrelin er prísurin á makreli trífaldaður, og semjan ger, at fiskast kann meira effektivt enn áður. Samstundis verður veiðigjaldið ásett eftir avreiðingarvirðinum fyri árið frammanundan. Verandi áseting virkar sostatt ímóti sínum endamáli.

Skotið verður upp at strika undantakið, sum ásetur lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Skotið verður upp at strika verandi áseting um lægri veiðigjald, tá ið kvotan minkar serliga nógv. Ásetingin kann hava ta ótilætlaðu avleiðing, at veiðigjaldið lækkar, hóast inntøkan hjá vinnuni ikki minkar, tí hægri prísur vigar upp ímóti eini lægri kvotu.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Lógaruppskotið var sent til ummælis hjá Reiðarafelagnum, Felagnum Nótaskip, Vørn og Fiski- og samferðslumálaráðnum.

Uppskotið hevur harumframt ligið til almenna hoyring á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri.

Inn komu tvey hoyringarskriv. Eitt frá Føroya Reiðarafelag og eitt frá Felagnum Nótaskip.

Feløgini mæla bæði frá at avtaka § 7.

Føroya Reiðarafelag leggur afturat, at um lækkingin í makrelkvotuni verður minni enn 70%, kann man avtaka ásetingina fyri makrel fyrra hálvár, so at avgjaldið verður verandi á 4,50 kr./kg fram til 31. juli. 2026.

Felagið Nótaskip og Reiðarafelagið vísa bæði á, at tað er óheppið at gera slíkar broytingar, tá útlit eru fyri munandi minni kvotum í 2026.

Feløgini vísa á, at prísirnir ikki viga upp fyri lækkandi kvotum.
Feløgini hava fingið gjørt eina meting, sum vísir, at sannlíkt minkar samlaða veiðivirðið í 2026.

*Tað er rætt, at við væntaðu kvotaminkingini næsta ár kann roknast við minni umsetningi. Fíggjarmálaráðið vísir á, at serliga fyri makrelin er prísurin hækkaður nógv, eftir at samlaða kvotan er minkað og at útlit er fyri framhaldandi minking. So hóast tað bleiv avreiddur tríggjar*

*ferðir so nógvur makrelur í 2023 í mun til ár, verður bæði árini avreitt fyri áleið somu upphædd.*

Bæði feløgini vísa á, at veiðigjøldini longu hækka í 2026, við tað at nýggj veiðigjaldstalva verður brúkt, tá veiðigjøld verða sett í 2026.

*Til tað er at siga, at hetta hendir samstundis, sum uppboðssølurnar detta burtur í 2026 og 2027, og vigar hetta upp fyri tí gjaldslækking, har kvotur fara frá at rinda uppboðssølugjald til at rinda veiðigjald.*

*Til síðst skal Fíggjarmálaráðið vísa á, at veiðigjaldið er gjald fyri serrættin at fiska. Veiðigjaldið er skrúvað soleiðis saman, at gjaldið hækkar, tá prísirnir hækka. Hetta tí at tilfeingisrentan serliga avhongur av prísinum, sum fæst fyri veiðina. Við ongum marknaði er ringt at siga, hvussu stór gjøldini eru í mun til veruliga virðið (tilfeingisrentuna). Men við teimum skipasølum, sum hava verið í seinastuni, er nógv sum bendir á, at veiðigjøldini sum heild eru nakað væl minni enn tilfeingisrentan.*

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Um ásetingin í § 7 verður virkin, merkir tað, at veiðigjaldið fyri 2026 minkar 50%.

Kvotur fyri 2026 eru ikki heilt kendar enn, og tí ber ikki til at siga hvør avleiðingin verður næstu árini. Men út frá tilmælunum frá ICES er sannlíkt, at makrelur kemur undir markið fyri helvtargjald í 2026.

Verður § 7 ikki strikað fer veiðigjaldið frá 1. januar til 31. juli í 2026 niður úr 4,50 kr./kg til 2,25 kr./kg. Prísurin á makreli er hækkaður nógv síðani juli mánað 2025, so alt annað líka verður veiðigjaldið á makrel hægri eftir fyrsta 1. august í 2026.

Fyri sild er longu helvtargjald í 2025. Um § 7 verður strikað, ella kvotan hækkar upp um markið fyri helvtargjald, merkir tað at veiðigjaldið 1. januar 2026 hækkar úr úr 0,75 kr./kg. til 1,50 kr. kg.

Fyribils roknar Fíggjarmálaráðið við, at avleiðingin av uppskotinum verður ein meirinntøka á 50-90 mió. kr. Hetta avhongur í stóran mun av, hvør makrelkvotan verður í 2026.

Um § 7 verður avtikin, verður inntøkan frá veiðigjøldum og uppboðsølugjøldum um 350 mió. kr. Broytingin hevur tí fulla ávirkan á úrslitið hjá landinum í 2026.

Kommunurnar fáa 2% av veiðigjøldunum.

Útrokngargrundarlagið í § 7 hevur við sær, at ein møgulig lækking í veiðigjaldinum fellur burtur, tá ið ein tíð er fráliðin, tí lægri kvota í einum ári telur við í útrokningargrundarlagnum fyri árið eftir. Tí er sannlíkt, at lægra veiðigjaldið bert hevði verið galdandi í eitt ár.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna. Veiðigjøldini eru ein útreiðsla fyri vinnuna. Avtøkan av § 7 merkir tí, at veiðigjøldini kunnu blíva hægri, enn tey annars høvdu verið.

Veiðigjaldið verður, sambært lógaruppskotinum, kravt inn á sama hátt sum í dag. Tí hevur lógin ongar umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Ongin viðkomandi tvørgangandi millumtjóðasáttmáli er á økinum.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið verður ikki mett at elva til markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið inniheldur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið strikar ásetingina í § 7 um at lækka veiðigjaldið, tá ið tøka kvotan lækkar serliga nógv.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Ongin broyting er í mun til verandi lóggávu.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn uttan rættarúrskurð.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

*Viðvíkjandi § 7*
Ásetingin verður strikað, og tí verður einki helvtargjald, tá kvotunar eru lágar.

Tilvísingarnar í § 5 stk. 3 og § 6, stk. 2 til § 7, stk. 2 verða strikaðar.

Verandi lýsta veiðigjald á uppsjóvarfisk hevur m.a. heimild í § 7 stk. 2, tí hevltargjald er fyri sild. Tá hendan lógarbroytingin er lýst, skulu tí nýggj veiðigjøld lýsast fyri makrel, sild og svartkjaft fyri tíðarskeiðið 1. januar 2026 til 31. august 2026.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 2. desember 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummælisskriv Felagið Nótaskip
Fylgiskjal 3: Ummælisskriv Føroya Reiðarafelag